### Sigurd positivt menniskja

Sigurd var sera positvur. Hann var altíð í góðum lag, skemtaði, og altíð við tí góða orðinum. Og hansara beinasemi er kent. Hetta merkti grannalagið eisini. Nærmasti grannin var bústovnurin hjá Sinnisbata á Sólteigi. Búfólkini nutu eisini gott av postiva lyndinum hjá teimum báðum Naenu og Sigurdi. Og frá Sólteigi fáa tey bæði Naena og Sigurd eisini allarbesta ummæli.

Sigurd var eisini ein sera fjølbroyttur maður. Tá hann kom heim úr Danmark arbeiddi hann sum sagt fyrst sum bakari hjá Frants Restorff og seinni i Køkubúðuni.

Sum fráleið fekk hann astma, hann toldi ikki rugmjølið. Í Danmark hevði hann bara arbeitt sum kondittari og hevði tí ikki verið í samband við rugmjøl í sínum arbeiði.

Hann gavst við at baka og fór at hugsa um okkurt annað. Beiggi hansara Petur búði úti í Grønlandi. Hann hevði handil í teirra kjallara, men var givin við tí. Hetta høli leigaði Sigurd og byrjaði at handla við vanligum húsarhaldsvørum og helt á har í 10 ár frá 1955-65.

Tá flutti handilin yvir í vesturbýin í Bókbindaragøtu, har Sigurð hevði bygt uppí síni egnu hús, so hann fekk størri og meira tíðarhóskandi høli. Dóttirin Ingibjørg arbeiddi meginpartin av sínum vaksna lívi har og gjørdi eitt ógvuliga gott arbeiði. Nøkur ár seinni spurdi Sigurd versonin, um hann kundi hugsa sær at komið at arbeitt í handlinum. Tá ið hann játtaði, var hetta tað besta, sum kundi henda Sigurdi. Versonurin var ógvuliga dugnaligur, og Sigurd var við at blíva troyttur av at vera so bundin.

Tá ið handilin lat aftur í 1988 hevði hann handlað í 33 ár.

### Hvítanes er eisini eitt skip

Men Sigurd var eisini ein undangongumaður í fiskiveiðu. Hvítanesmenninir vóru millum teir fyrstu, sum fóru í rækjuvinnuna fyri meira enn 30 árum síðani. Teir bygdu Hvítanes, sum var eitt tað fyrsta rækjuskipið fyrst í 1970-unum. Honum dámdi væl at fara niður við at selja lastina, og tá plagdi hann at vera kokkur.

Inn í millum tók hann túrar við fraktbátum, sum hann átti í, táið kokkur manglaði. Og kokkur var hann av teimum bestu. At sigla við fraktbátum var ikki tá tað best lønta. Men táið tað fréttist, at Sigurd skuldi við, stóð ikki á. Ikki bert tí hann var framúr kokkur. Men hansara lætta lyndi gjørdi tað hugaligari og stuttligari at vera umborð.

Seinast hann var burturi var við táverandi Skálaberg í Grønlandi umleið 1990. Tá var Sigurd 72 ár. Teir manglaðu kokk. Heitt varð á Sigurd, sum játtaði. Tá kokkurin so kemur umborð, mundi manningin dottið á afturpartin. Hetta var jú ein fólkapensjonistur. Men væl royndist. Manningin fekk nýbakaðar bollar hvønn morgun, og var hetta neyvan dagligur kostur umborð á fiskiskipum.

Sigurdi dámdi væl at hava fólk um seg. Hann gjørdi eisini nógv av at vitja onnur. So hann kendi ein hóp av fólki.

### Rætting

**Í seinasta parti varð greitt frá, tá ið Dánjal og felagar vóru í New York. Tað var Anna, systir Johannes og ikki Hans í Rættará, sum tók ímóti teimum. Hon og maðurin búsettust seinni í Drammen í Noregi. Tey vóru barnleys.**

### Næstu ferð

**Komandi partar verða um størstu vanlukku í Føroyum, sum hendi í mai fyri 75 árum síðani, tá ið Nólsoy og Neptun gingu burtur við tilsamans 43 monnum**



*Umborð á Baki: **F.v.** Páll Heinesen, Júst Rubeksen, Petur Danielsen og Joen Peter Joensen*

# Petur var sjógarpur

Petur var føddur í 1914 og gjørdist 92 ára gamal. Hann hevði eitt langt lív á sjónum. Hann var bert 13 ára gamal, tá ið hann fór á Suðurlandið at draga hesar stóru toskarnar! Sum so mangir aðrir kom hann seg skjótt og gjørdist góður fiskimaður

Fyrsta túrin var hann við Slatrinum, sum tá var deyðsiglari. Petur gjørdist so ringur av sjóverki, at hann lovaði, at hann fór ongantíð avstað aftur. Men sum hjá so mongum øðrum, so javnaði hetta seg.

Petur var eisini blaðungur, tá ið hann tók setiskiparaprógv. Hann fór sum skipari við Isabellu, men mátti hava flaggskipara, av tí at hann var so ungur. Síðan sigldi hann fast sum yvirmaður.

Í seinnu helvt av tríatiárunum fór Petur við trolara. Fyrst við fyrsta Skálaberg og síðan við millum øðrum Norðbúgvanum, sum hann sigldi við undir krígnum. Aftan á kríggið sigldi hann í fleiri ár við Vesturskin, sum Svenning Johannesen førdi. Svenning gevur Peturi tað ummæli, at hann var ein úrmælingur.

Við teimum seinast nevndu skipunum kom Petur rættiliga at standa sína roynd sum sjómaður. Við Norðbúgvanum, tá teir vóru bumbaðir av týskarum undir krígnum, og við Vesturskin, táið teir í 1953 mundu kollsiglt í Mykinesfjørði, og tað ráddi um at fáa dekslastina av lýsiføtum fyri borð fyri at rætta skipið upp. Ein maður, sum var saman við Petur við "Norðbúgvanum" í fleiri ár, mintist Petur sum framúr raskan, og sum "eitt deiligt menniskja."

### Átti part í rækjusøguni

Tá frystilínuskipið Bakur kom fyrst í 60-unum, fór Petur við har, og her kom hann at sigla saman við slóðaranum John Dam. Sonurin, Dánjal Pauli, var eisini við.

Allir skipsfelagar geva Peturi tað besta skoðsmál. Tað var eingin loyna, at John Dam kundi vera nakað buldrasligur, men Petur lat seg ikki syfta, og hetta boygdi John seg eisini fyri.

Petur eigur eisini ein part av okkara rækjusøgu. Saman við soninum Dánjal Paula og bróðurinum Sigurd lótu teir Hvítanes byggja á Tórshavnar Skipasmiðju í 1969. Hvítanes var upprunaliga bygdur sum frystilínuskip, og vóru teir næstir eftir Vesturvarða at fara at royna eftir rækjum til havs í Grønlandi. Væl bar til, og nøkur ár seinni bygdu Dánjal Pauli og Petur seinna Hvítanes, sum eisini gekk væl so leingi, sum tað bar til hjá føroyingum at fiska rækjur lønandi. Teir eiga tískil eisini sín part av rækjusøguni, sum tað eisini er greitt frá í bókini um John Dam.

Tíverri fekk Petur skaða í eyguni og mátti gevast at sigla, tá hann var 60 ára gamal, men tá hevði hann eisini havt eitt langt lív á sjónum, og hann hevði sjálvur upplivað so at siga alla ta menning, sum hevur verið innan fiskiskap.

### Dyggur stuðul á heimafrontinum

Petur giftist ungur við Signhild av Skála, sum fylti 94 ár nú sunnudagin. Tey náddu at vera gift í nærum 70 ár.

Avrikini hjá Petur á sjónum høvdu ikki kunnað latið seg gjørt uttan dyggan stuðul á heimafrontinum.

Var maður við skipi, so var hann við hvønn túr, og merkti hetta veruliga, at maðurin var burtur alt árið við bert nøkrum fáum døgum heima millum túrarnar. Petur segði seg bert hava havt tveir frítúrar alla ta tíðina, hann var til skips. Hetta setti stór krøv til konurnar, sum komu at hava alla ta dagligu ábyrgdina av húsi og heimi.

Hóast blindur so fylgdi hann væl við. Royndi onkuntíð at fáa hann at greiða frá sínum lívi á sjónum. Men hann var alt ov lítillatin til at koma við teimum stóru frásagnunum og helt, at hann hevði ikki upplivað nakað serligt!



*Petur og Signhild*

Sosialurin